# Keypa til heimið

**Blómuhandlar hava úr at gera um páskirnar. Páskaliljur, páskaprýði og dekoratiónir eru at fáa og yvirhøvur er guli liturin ráðandi**



MIÐBÝURIN
*Dagfinn Olsen*

Blómuhandlarnir, og starvsfólkini har, merkja væl páskahøgtíðina. Nógv er at gera.

Soleiðis er eisini í blómuhandlinum Akkuleya í Niels Finsensgøtu í Havn.

Har eru tað t.d. páskaprýði, dekoratiónir og páskaliljur, ið fara um diskin í hesum døgum.

Men uppá spurningin, hvørt tað eru menn, ið keypa til konurnar, ella øvugt, siga tey í Akkuleya, at soleiðis tykist hetta ikki at hanga saman um páskirnar. Páskirnar eru serlig høgtíð og tá verður keypt til heimið.



### Gult

Men hesa tíðina er eingin ivi viðvíkjandi ráðandi litinum. Guli liturin er hann, ið setir dám á. Nú, eins og áður. Hetta broytist ikki, tykist.

Hvørt fólk yvirhøvur eru glaðari fyri blómur nú, enn áður, er ilt at siga, men í Akkuleya er eingin ivi. Sera nógv er at gera um páskirnar og tað tykist, sum er árliga ein vøkstur at hóma í virkseminum.

Og vakurt er við páskaliljum og gula litinum um páskirnar. Og tey, ið ikki hava stundir sjálvi at seta seg við saksinum, kunnu eisini leita í blómuhandlarnar, um hugurin er til dekoratiónir ella páskaprýði.


## Páskatilboð frá Seytjan

Toppar ymiskir litir einans 99,-

Blusir ymiskir litir einans 99,-

Diesel keppar ymiskir litir einans 99,-

Allar buksur frá Fransa -20%

Maga ketur ymiskir litir einans 119,-



Bert galdandi til og við 14. apríl

Seytjan

Í Klaksvík tel. 456517 • Í Havn tel. 311305



RYGGSEKKIR • STIVLAR • JAKKAR OSV.

## Útgerð til øll endamál



Vit hava nýheimkomnar jakkar og skógvar

Dygd og trygd til ein rímuligan prís.

Hjá okkum er góðskan í hásæti

Skótabúðin

Hoydalsvegur 10 • Postboks 1089 • 110 Tórshavn • Tel. 317777




# Mentanarnáttin nærkast

**Kunningarstovan er samskipari í Miðbýnum, umframt at vísa vaksandi tali av føroyingum og útlendingum til rættis í Havn. Mong tiltøk eru á skránni komandi vikurnar, men ætlanirnar um eina mentanarnátt eru sera spennandi og loyvini eru nú fingin til vega. Møguliga fara eisini eini 600 fólk at trína dansin á Vaglinum í mai**

MIÐBÝURIN
*Dagfinn Olsen*

Í táttinum Miðbýurin, hevur fyrr verið trivið í ætlanirnar um eina mentanarnátt í Havn.

Ingigerð á Trøðni, leiðari á Kunningarstovuni í Havn sigur, at enn verður arbeitt við hesum ætlanum. Nevnd er vald, men enn hevur eingin veruligur fundur verið. Tó er komið so væl á leið, at loyvini eru fingin til vega.

– Eisini eru brøv og fax send út, sigur Ingigerð.

Hugtakið mentanarnátt er ikki ókent í londunum kring okkum. T.d. varð í fjør skipað fyri mentanarnátt í Keypmannahavn. Fólk sluppu at vitja støð, bygningar og stovnar. Ofta eisini støð, har vanliga ikki verður vitjað. Nógv nýttu t.d. høvið at vitja í Fólkatinginum, har fólk vístu runt og greiddu frá, umframt at flokkarnir skipaðu fyri tiltøkum í hølum sínum. Eisini hendi ymiskt kring býin hesa nátt.

Ætlandi verður mentanarnáttin í Havn 1. juni.



### Rulla páskaregg

Mong tiltøk eru í Havn komandi vikurnar. T.d. spælir nýggi leikbólkurin Spírar leikin Músafellan.

Felagið Tórhavn hevur mong ár á baki. Ein táttur, umframt gongutúrar, hevur verið árliga tiltakið at rulla páskaregg.

– Vit hava rullað páskaregg í felagnum í fleiri ár. Fyrst fóru vit ofta niðan í hagan. Men seinnu árini eru vit farin, har fólk vanliga fara. Seinnu árini hava vit verið í Kyrdali, greiðir Ingigerð á Trøðni frá.

### 600 fólk á Vaglinum

Tann 19. mei skipar Tøkum Lætt fyri dansistevnu í Havn. Tað hevur ikki eydnast at fáa orð á formannin í felagnum, men væntast kunnu eini 500 — 600 fólk úr øllum landinum til Havnar til hesa stevnu. Tað sigst, at ætlanin eru frammi um at seta stevnuna á Vaglinum. Um ferðafólk tá eru í høvuðsstaðnum, verða tey óivað bilsin og glað, um tey hitta eini 600 dansandi føroyingar í føroyskum búna í Havnargøtum.

Eftir flaggdagshaldið á Vaglinum flaggdagin, verður konsert í Grasagarði, har kór frá KFUM & K fer at syngja.

Talið av vitjandi á Kunningarstovuni í Havn er vaksandi. Eini 25.000 vitjandi eru nú árliga. Av hesum eru eini 11 til 12.000 útlendsk ferðafólk.


## Wrangler



Nógv nýtt heimkomið frá

INTOWN SIMPLICITY
PAS JEANS & JACKETS
Lipo Lipo FROM ALL OF US
2'BIG AARHUS
Ofelia
Wrangler THE AUTHENTIC WESTERN JEANS

Wrangler SHOP
N. Finsensgøta 23 Tel. 31 47 10



## Fríggjadagin 6. apríl er opið til kl. 20.00



FLJÓÐIÐ

Si un ar a 100 rs a n 1311 18



## Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.



Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo

ella post@sosialurin.fo

Sosialurin



Lesið eisini Sosialin á Internetinum

www.sosialurin.fo